# tankar um lívið

## Njóting ella skylda?

*Kim Simonsen skrivar:*

Er eydnan tvinnað saman við njóting, huga og gleði? Ella skal eitt væleydnað lív skiljast út frá hugtøkunum um, hvat er rætt, gott og um lívið verður livað í tráð við góðar menniskjaligar dygdir? Hvat eydnan er varð dugliga kjakast um í grikskari heimspeki.

Tá vit hoyra orðið hedonisma, hugsa vit mangan um eina lívsnjótandi hugsan, men hetta hugtak varð upprunaliga ikki knýtt at nakrari ómoralskari ovurnjótan. Hvørki kristindómurin og rómverska mentanin skiltu grikskar tankar til fulnar, og bæði mentanarøki avskeplaðu tí mangan ta tilvitan vit í dag hava um grikska hugsan. Paulus ferðaðist t.d. víða í Grikkalandi og lærdi nógv um grikska hugsan, ið enn fjalir seg í kristindóminum. Kristin hugsan hevði at lívsnjótandi hugsanini hjá hedonistunum, men í Nýggja Testamenti møta vit mangan eini hóvsamari lívsgleði, har t.d. vín, matur, sangur og dansur vóru sjálvsagdir lutir í lívinum. Meiri er tað eftirtíðin, ið hevur knúskað menniskjað við boð um at njóta er synd. Hjá hedonistinum Epikur (341-270 f.Kr) møta vit ikki ómettuligari njóting, men tankanum um javnvág og alt við máta, sum ein veg til eydnu her á jørð. Hjá honum og øðrum hedonistum er tankin hann, at øll tráa vit eftir tí ið gleðir okkum, tað ið vekir hug okkara og lystir. Somuleiðis royna vit at sleppa undan pínu og tað okkum ikki dámar. Moralurin aftan fyri hetta er individualistiskur, soleiðis at tað, ið gleðir ein er endamálið at tráa eftir í sjálvum sær fyri okkum. Hetta er ikki um at skapa so stóra eydnu fyri so mong sum gjørligt, men um at fáa frið til t.d. at finna fram til egnar tørvir, burtur frá heimsins larmi og stríði, og tá hetta er tað einasta lívið vit hava, er umráðandi at njóta løturnar. Gjørdu vit øll tað, so vóru vit øll eydnuríkari.

Hin kendi sofistiski skúlin av heimspekingum fór longur enn hedonistarnir. Hjá teimum kundu mannadygdir, eydnan og allir tankar um tað góða lívið bert avgerast av kenslunum hjá tí einstaka. Tað góða er soleiðis í støðugari broyting í tráð við, at samfelagið broytist. Henda moralska skeptisisma og relativisma er ein vantandi trúgv uppá, at tað góða kann finnast, og at alt vit kunnu finna bert er skapt og tí eisini vil broytast. Mótstøðumenninir til hetta sjónarmið vóru m.a. Sokrates, Platon og Aristoteles, ið ikki bert vildu tosa um njóting hins einstaka, men um tað, ið er rætt, gott og í tráð við almennar dygdir. Bæði Sokrates og Platon meintu, at tað góða og tað rætta var nakað absolutt, ið menniskja kann fáa innlit í við at brúka sín fornuft. Bert tey menniskju, ið vilja nýta sín fornuft í samsvari við tær góðu dygdirnar, kunnu verða eydnurík. Millum hedonistarnar, sofistarnar vóru stoikarnir, ið royndu at samantvinna kenslurnar hjá tí einstaka av eydnu, við tað at vera í samljóði við fornuftina og náttúruna. Hin vísi hevur tamarhald á sjálvum sær og tí er vísdómurin fyri stoikarin tann dygd, ið saman við dirvi, rættvísi og hóvsemi, tað ið ger av um ein fær frið í sinni og um lívið fer at eydnast. Tørvir, órógv og vantandi samljóð eru størstu vandarnir fyri ein stoikara. Lætt er tó at finnast at hesum, at henda ró kann enda sum rein apati, ella frælsi frá øllum kenslum og tað er ikki tað vit modernað fólk halda vera tað rætta.

Soleiðis byrjaðu modernaðu tankarnir um tað góða lívið innan grikska hugsan, har ikki varð skilt ímillum tankar um eydnu og tað moralskt-etiskt rætta og góða. Seinni gjørdist teir etisku tankarnir teir, ið meiri áhugi var fyri. Í nýggjari heimspeki, tvs. aftaná miðaldar kristna heimspeki, hevur spurningurin um góða lívið verið hildin at vera púra subjektivur. Innan eina týðandi grein av etiskari heimspeki: utilitarismu gjørdust tankar um tað góða lívið bert ein spuningur um lyst og subjektiva hug hins einstaka. Hjá Kant og í kantiansku etisku traditiónini er tað fremsta hin praktiski fornufturin, tað ið skal gerast, ið bert er galdandi fyri tað moralskt-etiska. Tað er tí ikki meiri enn 150 ár síðani, at modernaðir heimspekingar komu fram við tí vit í dag rópa lívsheimspeki, ið m.a. inniheldur eksistensheimspeki. Innan modernaða heimspeki vekja hesir tankar enn heldur lítlan ans, men hetta er tó hin fólkakærasti parturin av heimspekini. Tað er hesin avleggarin av heimspekini, ið m.a. hevur lagt lunnar undir nýggju vísindina, sálarfrøðina.

## Málbitin

»Bókin (el. plátan) selur væl« er ikki føroyskt, men ensk-danskt í føroyskum hami, tí sagnorðið selja er ikki óávirkandi í føroyskum. Eigur heldur at vera »bókin selst (ella eisini selist) væl«.

»Tey vóru tvungin at gera tað« er heldur ikki føroyskt mál. Sagnorðið tvinga hevur aldri verið sterkt bent í føroyskum ella norrønum - hvør kundi sagt »hann tvang hana at gera tað«? Tað eitur tvingar í 3. pers. nútíð, tvingaði í tátíð og tvingað í 2. lýsingarhátti.»Tvungin« sum lýsingarorð er heldur ikki vert at lívga. Har kundu vit í staðin sagt kravdur ella skyldu-, t.d. skyldusparing, kravdar lærugreinir.

Føroyar. Navnið á landi okkara er í fleirtali, og tí skulu øll lýsingarorð, ið standa at hesum navni, og øll sagnorð, sum hava tað sum grundlið, vera í fleirtali. Tí átti ongum at komið av munni ella úr penni tílíkt sum »alt Føroyar« og »Føroyar vann« - eigur eyðvitað at vera allar Føroyar og Føroyar vunnu - ikki »Føroyar er vakurt!« men Føroyar eru vakrar!

*Úr Orðafari nr. 1. 1986*

## Eli í Snarskivuni

Hósdagin 15. november lat upp nýggj framsýning á torginum, har Snarskivan hjá Tórshavnar Býráð heldur til. Hesa ferð er tað Eli Smith, listamaður, sum sýnir fram. Á framsýningini eru 20 oljumálningar, ið eru til sølu. Framsýningin verður hangandi uppi til fyrst í komandi ári. Høvi er at síggja framsýningina, tá opið er í Snarskivuni, mánadag – fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Elin S. Winther Poulsen, winther.nagata@mindspring.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## The Show Must Go On

Alt, sum teir seinastu tveir mánaðirnar er skrivað og sagt hiðani úr Ameriku, hevur snúð seg um tað, sum hendi hin 11. september, og fylgjurnar av tí. USA og heimurin allur hava verið merkt av dapurskygni og stúran fyri framtíðini. Sum so mangan, tá tíðirnar eru daprar, kunnu Hollywood og undirhaldsídnaðurin gera sítt til, at fólk gloyma veruleikan eina løtu.

Hetta vikuskiftið verður fyrsti filmurin um hin víðagitna Harry Potter frumsýndur fyri almenninginum, bæði her í USA og í Europu. Enntá frætta vit, at filmurin eisini verður sýndur í Havn longu nú. Eitt sindur snópið, at vit, sum hava okkara dagligu gongd í Hollywood, ikki kunnu hava tann framíhjárætt at sleppa at síggja Harry Potter áðrenn tit í Havn!

Sjónvarpið hevur á øllum rásum ta seinastu tíðina sent lýsingar og kut úr filminum. Longu 2 vikur undan fyrstu sýningini, byrjaðu biohallirnar at selja atgongumerki, og vit vóru sjálvandi í góðari tíð, og keyptu atgongumerki alt fyri eitt. Einki og eingin skuldi nokta 11 ára gamla Halgiri at síggja Harry Potter frumframsýndan. Halgir hevur lisið ensku bøkurnar á tamb fimm ferðir, umframt at hann eisini hevur lisið tær báðar føroysku bøkurnar, ið higartil eru komnar út. Teir seinastu 2-3 mánaðirnar hevur hann talt dagarnar til tann 16. november, tá hann umsíðir skuldi sleppa at síggja filmin, og hann hevur longu tryggjað sær at sleppa at síggja hann fleiri ferðir. Fyrst saman við okkum gomlu og seinni saman við fastrini, sum ikki fær komið við til frumframsýningina.

Halgir hevur tó stóra skomm av foreldrunum, sum ikki hava lisið Harry Potter enn. Omman í Hoyvík er byrjað, og kanska foreldrini fara í holt við bøkurnar, tá tey hava sæð filmin. Foreldrini hjá flestu vinfólkunum hava langt síðani lisið bøkurnar, og ein vinmaður Halgirs segði mær, at foreldur hansara hava bøkurnar á bandi, soleiðis at tey kunnu lurta í bilinum. Tað er snilt, tí í einum stórbýi sum Los Angeles fer nógv tíð í bilinum. Tá vit fluttu higar fyri hálvum fjórða ári síðani, undraðist eg mangan á, hvat amerikanarar kundu finna uppá at gera í bilinum: Eta, drekka, smyrja sær og so sjálvandi hitt ónevniliga, sum tey sambært amerikonskum filmum tíðum nýta baksetrið til. Nú ein morgunin mátti eg tó flenna, tá ein maður sat og rakaði sær av einslistum, meðan hann bíðaði eftir grønum ljósi. Tað skal sigast, at hann brúkti maskinu, og ikki sápu og knív!

Í skrivandi stund, sum er ein vika áðrenn tú lesur hetta bræv, siti eg við farteldun á einum hotellkamari í Las Vegas, higar vit eru komin at halda føðingardagin hjá manninum í húsinum. So eg fari at skunda mær út í poolin, har maður og børn bíða. Hóast november er nærum hálvur, er heitt her, og sólin skínur av bláum himli, so hjá okkum er dagliga klædnadraktin bikini, og ikki kavadrakt og vøttir, sum børn og vaksin í Føroyum er ballað í hesa ársins tíð. Onkran framíhjárætt skulu vit hava, tá vit nú ikki sleppa at síggja Harry Potter í Havnar Bio......!



# Óheft rødd á Fólkatingi

Javnaðarflokkurin vil við síni umboðan framhaldandi vera føroyska røddin á Fólkatingi, sum stendur óheft av donskum partapolitikki og donskum innanríkispolitikki

Javnaðarflokkurin hevur hetta seinasta valskeiðið til fulnar hildið vallyftið um at vera óheftur av donskum partapolitikki og donskum innanríkispolitikki.

Í 1998 tryggjaði danska stjórnin sær valdið við 89 fólkatingsumboðum. 88 vóru úr Danmark og eitt úr Grønlandi. Javnaðarflokkurin atkvøddi ikki og er tí ikki partur av teimum 89 umboðunum, sum eru parlamentariska grundarlagið undir stjórnini.

Eftir seinasta fólkatingsval var støðan nevniliga tann, at borgarligi vongurin hevði kunnað felt stjórnina hjá Nyrup, um hann fekk 90 fólkatingslimir at atkvøða ímóti henni. Men borgariligi vongurin fekk bara 89 atkvøður, har ímillum eina frá Óla Breckmann. Og við tað, at føroyska javnaðarumboðið hevði eina óhefta støðu, varð stjórnin hjá Nyrup ikki feld.

Javnaðarflokkurin leggur seg ikki út í donsk viðurskifti. Men vit vilja virka og røða fyri loysnum, sum eru føroysku tjóðini at gagni. Javnaðarflokkurin umboðar Føroyar og føroyska fólkið á Fólkatingi.

# Vel samstarv og loysnir saman við Javnaðarflokkinum

Við samstarvi, heldur enn klandri, ber til at finna eina loysn fyri broytingum í ríkisrættarligu viðurskiftum Føroya

Tað er eingin ivi um, at fólkatingsumboðið hjá Javnaðarflokkinum fer at arbeiða fyri, at vit koma burtur úr naggatódnini og konfrontatiónunum millum føroyskar og danskar myndugleikar. Í staðin fyri áhaldandi ósemjurnar, vilja vit hava eina semju um eina loysn á ríkisrættarligu viðurskiftunum.

Okkara uppskot til eina loysn er framvegis Sjálvstýrislógin, sum greitt ásetir, at Føroya Løgting hevur evsta vald á øllum yvirtiknum málum, og at einki mark skal vera fyri, hvørji mál verða yvirtikin. Hetta er ein sáttmáli á altjóðaræattarligum støði, sum greitt staðfestir, at allur avgerðarrættur liggur hjá Løgtinginum, og harvið hjá føroyska fólkinum.

Broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum eru eitt føroyskt fólkaynski, sum Javnaðarflokkurin fult tekur undir við. Og tí vil Javnaðarflokkurin við síni umboðan upplýsa og kunna bæði á Fólkatingi og millum manna í Danmark um Føroyar, um føroysku tjóðina, føroyska mentan og søgu, um føroysk samfelagsviðurskifti og um føroyska fólkaynskið um broytingar í viðurskiftunum landanna millum.

Javnaðarflokkurin hevur nevniliga ta fatan, at tað er við at upplýsa og við at samstarva, at tað ber til at fáa eina góða avtalu við danir um broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Broytingar, sum staðfesta, at evsta valdið liggur hjá føroyska fólkinum.